Bjarnatænastan



Fyrrverandi bankastjóri (sí tekn.) stevnir, tí hann heldur seg hava fingið alt ov lítið fyri avrik síni sum bankastjóri

Slættaratindur tódnaður

Í summar vóru fólk frá Umhvørvisstovuni saman við landsstýrismanninum Kára P. Højgaard á Slættaratindi og gjørdu GPS uppmátingar, at kanna hæddina á hægsta tindinum í landinum.

Kortmyndugleikin er danskt málsøki, og tí vórðu uppmátingarnar sendar danska Kort og Matrikelstyrelsen.

Úrslitið av útrokningunum er nú komið, og vísa tær, at Slættaratindur ikki er 882 m, sum higartil hildið, men 2 m lægri, altso 880 metur.

Úrslitið ber í sær, at neyðugt verður at rætta føroyakortið. Somuleiðis verður neyðugt at fáa broytingina við í komandi Heimsatlasið, sum Nám er í holt við, eins og nógvar bøkur um Føroyar mugu broytast. Googlar tú »Slættaratindur« koma 28.100 úrslit, so har skulu eisini nógvar broytingar gerast.

Umhvørvisstovan hevur eitt framkomið kortleggingartól, har tað, við góðum neyvleika ber til at áseta hæddir eftir flogmyndum.

– Tað var júst í hesum tóli, at vit fingu varhugan av, at Slættaratindur ikki er so høgur, sum áður hildið, og tí blivu gps-mátingarnar gjørdar, upplýsir Stein Fossá á Umhvørvisstovuni.

Ætlanin er í næstum at kanna hægstu fjøllini í øllum oyggjunum, soleiðis at rættar hæddir kunnu setast á allar oyggjar. Vit meta, at tað ikki er neyðugt at fara upp á fjøllini at eftirkanna hæddirnar, men at hetta verður gjørt eftir flogmyndum.

Í MORGIN

8/11 °C



Fyrrapartin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt, men seinnapartin upp í stívt andøvsgul av landsynningi og trgn. Hitin millum 9 og 12 stig.

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið

SUNNUDAGIN

10/13 °C



Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og stundum regn ella ,mjørki. Hitin millum 9 og 12 stig.

MÁNADAGIN

11/14 °C



Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 9 og 12 stig.

Veðrið týsdagin og mikudagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind millum útnyrðing og landnyrðing og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig.

LUFTTRÝSTIÐ



Síðstu nátt:
Eitt lágtrýst, á 50N-39V fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani til Írland kemur hendavegin.



Komandi nátt:
Lágtrýstið yvir Atlantshavinum fer í landnyrðing og hitabrúgvin til Skotlands kemur hendavegin.

HITALAG



Normal 1961-1990: 9,1°C

AVFALL



Miðal 1961-1990: 128 mm

VESTFALLSKYRRINDI

23. august	Mánin næstur jørðini
31. august	Fullmáni
7. september	Mánin longst frá jørðini
8. september	Seinna kvarter

Kelda: Almanakkin 2012

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
7. sept.	-	12:14	11:14	23:49	11:29	-	01:52	14:14	02:52	15:14	10:29	23:04	09:29	22:04	00:07	12:29	01:07	13:29	11:59	-	00:52	13:14
8. sept.	00:49	13:24	-	12:24	00:04	12:39	02:49	15:24	03:49	16:24	11:39	-	10:39	23:14	01:04	13:39	02:04	14:39	00:34	13:09	01:49	14:24
9. sept.	01:59	14:35	00:59	13:35	01:14	13:50	03:59	16:35	04:59	17:35	00:14	12:50	11:50	-	02:14	14:50	03:14	15:50	01:44	14:20	02:59	15:35
10. sept.	02:57	15:19	01:57	14:19	02:12	14:34	04:57	17:19	05:57	18:19	01:12	13:34	00:12	12:34	03:12	15:34	04:12	16:34	02:42	15:04	03:57	16:19
11. sept.	03:41	16:03	02:41	15:03	02:56	15:18	05:41	18:03	06:41	19:03	01:56	14:18	00:56	13:18	03:56	16:18	04:56	17:18	03:26	15:48	04:41	17:03